## Christian stýrdi fundinum

Í mun til flestu av undanfarnu fundum, so var tað ikki Jógvan Arge, sum var orðstýrari. Óli Holm, forseti, greiddi við fundarbyrjan frá, at hetta nú einki hevði at gera við, at FSF argaðist inn á Arge-mannin.

Í nýggja lógarverkinum, sum partvíst varð samtykt í fjør, stendur, at fundarstjórin skal vera løgfrøðingur, og tað var hetta, sum var orsøkin til skifti á sessinum.



## HB atkvøddi ikki

Tá atkvøtt varð um nýggja lógarverkið hjá FSF, var eingin reyð nei-atkvøða havd á lofti. Men við HB-borðið kom eingin atkvøða fram yvirhøvur. – Vit vóru av teirri fatan, at hetta gekk ov skjótt fyri seg. Sjálvandi er málið viðgjørt á formansfundi, og sum fundarstjórin segði, so kundu vit kanska havt gjøgnulisið tilsenda tilfarið. Sjálvur havi eg tó verið burtur í eitt ár, og tí var eg at kalla eitt sindur ørkymlaður, tí tað tóktist, sum var eingin viðgerð av reglunum yvirhøvur, sigur Birgir Enghamar, formaður í HB. Hann leggur tó dent á, at við at atkvøða blankt, markeraði HB tó ikki, at teir vóru ímóti lógarbroytingunum.

## Kvinnurnar valda í FSF

**Hóast eingin kvinna var til staðar á aðalfundinum, so eru kvinnurnar væl og virðiliga umboðaðar í teimum báðum tungu nevndunum, sum skulu viðgera kærumál**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eitt »vælkomnir« sum Óli Holm beyð aðalfundinum leygardagin. Ikki eitt einasta konufólk var millum fundarluttakararnar á aðalfundinum hjá FSF, og tað undirstrikar helst tann veruleika, at fótbóltur framvegis er ein ítrótt, har mannfólkini dominera.

Í sjálvari Starvsnevndini hjá FSF sita eisini bara mannfólk, men at hesir eisini hugsa um javnstøðu, kom til sjóndar, tá Aganevndin og Yvirkærunevndin vórðu valdar.

Her hevði nevndin uppskot um nevndarval, og tað var sjónligt, at javnstøðan var í huganum, tá hendan var vald. Í Aganevndini, sum helst kemur at taka sær av flestu kærumálunum, er talan soleiðis um kvinnuligan meiriluta. Og kvinnuligt umboð er eisini í Yvirkærunevndini, har menninir tó sita tveir móti einum. Eisini er talan um politiskt korrekt kynsbýti innan varalimirnar í teimum báðum nevndunum.

# Ongan tíð aftur Páll

**Nýggju kappingarreglurnar benda á, at eisini FSF hevur fingið sína læru av drúgvasta kærumálinum í føroyskari fótbóltssøgu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stóri trupulleikin í viðgerðini av marathon-kærumálinum um Páll M. Joensen í fjør var, at mannagongdirnar innan spælaraskráseting og spæliloyvi ikki tótkust nóg greiðar. Ein sannroynd, sum eisini varð staðfest, tá hvørki Ítróttardómstólur ella Dómsnevnd vildu góðtaka, at málini um Páll M. Joensen, Knút Vesturtún og Klæmint Matras skuldu viðgerast hvør sær, fyrr enn FSF hevði lyft próvbyrðuna fyri, at

**Greiðar mannagongdir**

Í nýggju kappingarreglunum verður púra greitt staðfest, nær spælari hevur loyvi at spæla.




Fyri spælara, sum altíð hevur spælt fyri eitt og sama felag, er ikki neyðugt við útskrivaðum spæliloyvi, men hesin skal nú vera tilmeldaður leikaralistanum hjá FSF. Men í teirri løtu, at spælari fyrstu ferð skiftir felag, skal spæliloyvi útskrivast, áðrenn hesin kann umboða nýggja felagið. Og eftir fyrsta skiftið verður tað til eina og hvørja tíð loyvisbrævið, sum er avgerandi fyri, hvørt spælari hevur loyvi at spæla ella ikki.

*FSF tykist hava gjørt sítt til, at helst mest umtalaða málið í føroyskum fótbólti nakrantíð ikki kann fáa eina endurtøku*

Umframt at minka um vandan fyri málum, sum hava eyðkent tær báðar seinastu kappingarnar um Løgmanssteypið, so hevur nýggja reglugerðin eisini ein annan stóran fyrimun. Hon gevur nevnliga eina greiða skráseting av ungum spælarum, og hetta er neyðugt, um føroyskur fótbóltur skal fáa ágóðan av ágóðan av transfer-reglunum, um ein føroyskur spælari onkra tíð skuldi verið seldur fyri stóra peningaupphædd.

**Foreldrini skulu játta**

Og so var eisini ein áhugaverd og kanska stuttlig krúlla á viðgerðini av nýggju Kappingarreglunum.

Fyri spælarar, sum eru undir 18 ár, er nú galdandi, at skal spælarin flyti spæliloyvi í annað felag, so er neyðugt, at foreldrini skriva undir flytingarskjal. Hetta fekk onkran til at viðmerkja, at tað kundi vera óheppi, um t.d. ein íðin HB-pápi noktaði soninum at skifta til B36. Og tað kann eisini hugsast, at eitt nú stóru havnarfeløgini komandi dagarnar fáa stóra tilgongd av smábørnnum á limalistan.

Hinvegin varð eisini onkur á fundinum, sum helt, at hetta var ein góð regla at hava. Serstakliga, tí slík skifti hjá ungum spælarum kunnu verða framd í illsinni av einstakari keðiligari hending, og at tá vildi verið gott, um foreldrini aktivt fara inn at loysa illstøðuna, heldur enn at børnini í illsinni skifta felag.

# Formansfundirnir hjálpa

**Tað tykist eingin ivi vera um, at sonevndu formansfundirnir greiða størsta partin av málunum, longu áðrenn farið verður undir aðalfundin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt av lyftunum, sum Óli Holm gav, tá hann fyri trimum árum síðani varð valdur í formanssessin í FSF, var, at hann vildi hava eitt tættari samstarv við feløgini.

Hetta varð gjørt við sonevndu formansfundunum, har mál leypandi verða tikin upp undir meira óformligum umstøðum, ið tó eru meira enn bara kaffifundir.

Og tað tykist eisini greitt, at hetta hevur havt sína stóru ávirkan. Sæð burtur frá, at spenningurin kring sjálvt formansvalið var stórur fyri einum ári síðani, so hava aðalfundirnir hesi trý seinastu árini verið munandi friðarligari, enn teir so ofta áður hava verið. Ja, úr einum fjølmiðlasjónarhorni vildi onkur kanska hildið fundirnar vera beinleiðis keðiligar, men tað í sjálvum sær kann nú eisini vera gott til tíðir.

Ikki minst gevur hetta umheiminum eina fatan av, at FSF sum felagsskapur nú stendur munandi sterkari. Ivaleyst er tað framvegis so, at menn eru ymiskir á máli um tey stig, sum verða tikin. Men orðaskiftið kring hetta verður nú í allar flestu førum hildið innan veggja á formansfundunum, meðan aðalfundirnir í størri mun snúgva seg um formalia, tá viðtiknu semjurnar skulu atkvøðast ígjøgnum.

Hetta var kanska serliga sjónligt leygardagin, tí sjáldan eru so umfatandi broytingar atkvøddar ígjøgnum ein og sama aðalfund við somikið lítlum orðaskifti, sum talan var um hesaferð.




*Formansfundirnir vóru eitt evni, sum Óli Holm alt fyri eitt legði stóran dent á. Og í dag er eingin ivi um, at hetta í stóran mun er við til at greiða flestu mál, so tey eru búgvin undan aðalfundinum*